# VW-konsernin nýggjan designstjóra



Audi R8 er eitt av flottu designunum hjá Walter de Silva



Walter Maria de'Silva



Nýggi Seat Ibiza verður skorin eftir sama leisti sum allir hinir Seat

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Kendi designstjórin hjá VW-konsernini: Walter Maria de'Silva, sum hevur staðið fyri designinum av Audi, Seat og Lamborghini, tók 1. februar 2007 við sum designstjóri hjá allari VW-konsernini.

Walter de'Silva er eisini kendur frá síni tíð hjá Alfa Romeo. Hann hevur t.d. teknað Alfa Romeo 156.

Walter Maria de'Silva er meistari í at geva teimum ymisku bilmerkjunum "persónligheit", t.d. hava Audi sín sermerkta stíl og á sama hátt hava Seat ein heilt annan stíl, soleiðis at øll í ferðsluni kenna mun á bilsløgunum.

Tá nýggi Seat Ibiza eftir ætlan kemur á marknaðin seinni í ár, verður hann skorin eftir sama leisti sum allir hinir Seat.




# Michelin maðurin klænkaður

Væl kendi Michelin-maðurin hevur nú klænkað seg.

Hóast hann ikki er beinleiðis klænur, hevur hann ein bilring minni og sær sunnari út.

Bibendum, ella betri kendur sum Michelin-maðurin, er ein av heimsins best kendu figurum. Í nýggjastu útgávuni er hann farin frá XXXL til XXL, verður sagt frá Michelin.

Nýggi Michelin-maðurin skal verða eitt fyridømi í sambandi við at eta sunt og fáa nokk av motión.

Tað er helst eisini betri fyri Michelin-mannin at vera klænur, nú hann skal vera við til Formel 1 koyringar um allan heim.



Nýggi Michelin-maðurin klænkaður



Soleiðis sá Michelin-maðurin út áðrenn klænikurin